## Framtøk

Politiska gølu
um Fiskasølu
summir tykjast at gera
at aðrir hálsvølin
sær skola við øli
heldur fútin ólógligt vera

Hann strammar skrúvu
á Klubbanum Tjúgu
sum ikki má jólabryggj selja
men stjóran á Rúsu
teir eru so fúsir
í Framtaksnevnd til at velja

*Edvard*

## Framsýning

Rannvá Holm Mortensen og Jóngerð Poulsen lata upp framsýning við 30 grafiskum myndum í smiðjuni í Lítluvík, mikudagin 3. apríl. Framsýningin verður opin gerandisdagar frá kl. 15 til kl. 19. Leygardagin og sunnudagin frá kl. 14. til kl. 19.




Sambandsflokkurin:

# Pensjónin skal skipast í trimum pørtum

**Spurningin um framtíðar pensjónistaskipan ætlar Sambandsflokkurin at loysa í trimum pørtum: Vanlig fólkapensjón, tvungin pensjónsuppsparing og sjálvboðin pensjónsuppsparing**



*Magni Laksáfoss er valevni fyri Sambandsflokkin í Norðoyggjum. Á tíðindafundinum mikumorgunin tosaði hann um, at tað er altavgerandi at finna eina langsigtaða loysn upp á búskapin.*

VALSKRÁ
*Heri á Rógvi*

– Ein alsamt vaksandi partur av fólkinum í okkara parti av heiminum verða pensjonistar, og trupult er at finna eina skipan fyri, hvussu pensjónirnar skulu verða í framtíðin.

Soleiðis byrjar Sambandsflokkurin partin um pensjónir í teirra valskrá. Pensjónirnar hoyra undir punkt trý, vælferðin.

Sambandsflokkurin sigur seg við hesum ásanna, at framtíðar pensjónspurningurin verður neyðugur at loysa, og tað er týdningarmikið, at funnið verður ein haldgóð loysn.

Samstundis sum hetta verður sagt, so heldur Sambandsflokkurin, at okkurt eigur at verða gjørt við verandi pensjónnistastøði í Føroyum.

– Endamálið við fólkapensjónini er at hon skal vera grundarsteinurin, sum skal tryggja øllum eina minstu upphædd, fyri at øll kunnu liva sámuliga, tá tey verða pensjonistar.

Verandi fólkapensjón í Føroyum er ikki nøktandi, og fyrr enn hon er tað, má sigast, at tíðin er ikki búgvin at seta aðrar skipanir í verk, sigur Sambandsflokkurin í sínari valskrá.

Loysnin til trupulleikan við framtíðar pensjónistunum skal loysa eftir tilmælum úr heimsbankanum. Í bókini Averting The Old Age Cricis mælir heimsbankin til at loysa trupulleikan í trimum pørtum:

Vanlig fólkapensjón, tvungin pensjónsuppsparing og sjálvboðin pensjónsuppsparing.

Spurningurin um eina framtíðar pensjónsskipan varð ikki loystur av sitandi samgongu. Nakrar mánaðir undan valið kom landsstýrið við einari pensjónshækkan til fólkapensjónistarnar, men bíðað verður enn eftir einari framtíðar skipan.

Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og valevni fyri Sambandsflokkinum, segði á tíðindafundinum, tá valskráin hjá Sambandsflokkinum varð løgd fram, at avgerandi at finna langsigtaða loysn upp á føroyska búskapin, har pensjónirnar eru ein partur av hesum.

### Eldrarøkt

Sambandsflokkurin hevur eisini tikið eldrarøktina við í valskránna. Lisbeth L. Petersen segði á tíðindafundinum fleiri ferðir, at Sambandsflokkurin ikki vildi seta nøkur konkret tøl á, tí hetta vildi óivað merkja, at mann kom at lova meira enn mann kundi halda. Hon legði stóran dent, at Sambandsflokkurin komandi fýra árini vil leggja stóran dent á almenna- og heilsuøkið og kanska serliga sjúkrahúsini.

Í Føroyum hava vit trý sløg av eldrarøkt: Røktar- og ellisheim, sambýlir og heimahjálp.

Røktar- og ellisheimini eru ætlaði óhjálpnum fólki, ið krevja nógva røkt. Vit hava í dag 272 røktarheimspláss, men sambært serkønum er akuttur tørvur á 150 – 250 plássum afturat.

Sambýli eru ætlaði fólki, sum ikki eru so illa fyri. Men vegna vantandi pláss á røktarheimum, eru í dag røktarsjúklingar á sambýlum, sigur Sambandsflokkurin í valskránni.



Sambandsflokkurin:

# Ríkisfelagsskapurin er fortreytin

**Sambandsflokkurin fer til val við Ríkisfelagsskapinum sum fyrstu raðfesting. Á øðrum og triðja plássi koma persónliga frælsið hjá tí einstaka og vælferðin. Alt er treytað av ríkisfelagsskapinum**



*Sambandsflokkurin fer til val fyri at verja ríkisfelagsskapin og vælferðina.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

VALSKRÁ
*Heri á Rógvi*

Hjá Sambandsflokkinum er eingin ivi: Ríkisfelagsskapurin er at meta sum fortreytin fyri samfelagnum í Føroyum. Aðalmálið í grein eitt hjá Sambandsflokkinum er ríkisfelagsskapurin, og hetta verður eisini staðfest í valskránni hjá flokkinum, ið varð almannakunngjørd mikumorgunin á tíðindafundi.

Tað skortaði heldur ikki við fólki. Umframt teir fimm tingmenninar, ið stilla uppaftur til valið 30. apríl, so vóru eisini boð send eftir so nógvum valevnum sum gjørligt at møta upp. Tað var ein fullsett sambandshøll á Hafnia.

### Ríkisfelagsskapurin fyrst

– Hetta valið fer at snúgva seg um ríkisrættarligu viðurskiftini fyrst og fremst, tað mugu vit bert ásanna, sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum.

Tað er eisini hesin sami ríkisfelagsskapurin, sum stendur ovast á plakatini á valskrá Sambandsfloksins.

Valskráin er ásett við trimum høvuðspunktum: Ríkisfelagsskapin, Persónliga frælsið hjá tí einstaka og vælferðina.

Hetta er tað sama, ið Flokkurin nýtti til fólkatingsvalið. Lisbeth L. Petersen segði á fundinum, at flokkurin hevði ætlað hetta uppleggið til løgtingsvalið, men teir hildu tað hóskandi at nýta uppleggið eisini til fólkatingsvalið, og hetta gav eisini úrslit, helt Lisbeth fyri á fundinum.

Sambandsflokkurin sigur ríkisfelagsskapin vera avgerandi fyri, at føroyska fólkið kann varðveita vælferðina og persónliga frælsið.

Sambandsflokkurin sigur seg raðfesta heilsuøki ovarliga næstu fýra árini, men flokkurin vil ikki seta nøkur tøl á, tá lyftini ikki altíð eru líka løtt at halda. Tey forsømdu økini skulu fáast í rættlag, men eingi tøl verða sett á.

### Nýskipan

Sambandsflokkurin hevur evnað til eitt Nýskipanaruppskot. Hetta er boðið hjá Sambandsflokkinum hjá sambandsflokkinum um, hvussu framtíðar ríkisfelagsskapurin skal virka.

Lisbeth L. Petersen segði á fundinum, at um vit fingu fullveldi, so vildu bert tey fáu og sterku yvirliga, og hetta ynskir Sambandsflokkurin ikki sum ein vælferðarflokkur.

Kjarnin í nýskipanaruppskotinum er at varðveita Føroyar sum part í ríkinum, og vit skulu varðveita grundlóg, kongshús og rættartrygd, og Føroyar skal vera sjálvstýrandi tjóð í ríkinum.

Lisbeth L. Petersen:

# Eitt lagnuval

**– Hetta valið er tað mest avgerandi í føroyskari søgu í longri tíð. Hetta verður eitt lagnuval millum loysing og samband, sigur Lisbeth L. Petersen**

VALSKRÁ
*Heri á Rógvi*

Lisbeth L. Petersen legði fyri innbodnum tíðindafólki og valevnum hjá Sambandsflokkinum fram, hvussu og hvat Sambandsflokkurin kundi hugsað sær at gjørt í tí føroyska partinum av heiminum komandi fýra árini.

Hon segði, at hon hevði verið við í politikki í nógv ár, og hetta valið var tað mest aktiva hon minnist.

– Vit hava fingið innbjóðingar ótrúliga nógvastaðni frá. Eg havi onga vita um so nógvar veljarafundir, og fólk venda sær í stórum tali til okkara. Hetta vísir, at tað er ein øgiligur áhugi fyri valinum, sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum.

Lisbeth L. Petersen ivaðist heldur ikki í týdninginum, ið hetta valið fer at hava.

– Hetta valið er tað mest avgerandi í føroyskari søgu í longri tíð. Hetta verður eitt lagnuval millum loysing og samband, sigur Lisbeth L. Petersen

### Rigga væl við Javnaðarflokkinum

Spurningurin, um hvør fer at gera samgongu, er ein spurningur, ein valla sleppur undan til tílík høvi. Nú hava tríggir av teimum fýra størru flokkunum í Føroyum lagt fram teirra valskrá. Hvør flokkur hevur sína áskoðan, hvussu ríkisrættarligu viðurskiftini skulu skipast í framtíðini.

Lisbeth L. Petersen undirstrikaði á tíðindafundinum, at valið hesaferð fer at snúgva seg um ríkisrættarligu viðurskiftini.

Um samgongumøguleikarnar segði hon, at Sambandsflokkurin ikki vil slaka í ríkisrættarliga spurninginum.

– Vit mugu síggja í eyguni, at tað er lítið sannlíkt, at vit og Tjóðveldisflokkurin fara í samgongu saman. Vit vita ikki rættiliga við Fólkaflokkinum og teimum smærru flokkunum. Skal tað snúgva seg um tey ríkisrættarligu viðurskiftini, so virkar Javnaðarflokkurin sum besta alternativi, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hóast teir ikki eru ein borgarligur flokkur, so hava vit fyrr arbeitt sera væl saman, og hetta kunnu vit gott fyristilla okkum fer at halda fram.

– Vit fara kortini ikki, sum sitandi samgongu, at nýta fýra ár upp á ríkisrættarliga spurningin burt urav. Vit vilja taka okkum av samfelagnum, ljóðar tað frá forkvinnu Sambandsfloksins.




*– Hetta valið er tað mest avgerandi í føroyskari søgu í longri tíð. Hetta verður eitt lagnuval millum loysing og samband, sigur Lisbeth L. Petersen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Gjalda skuldina

Sambandsflokkurin hevur ongar ætlanir um at fara niður til Danmarkar at biðja um øktan blokkstuðul.

–Vit ætla okkum ikki til Danmarkar at biðja um meiri blokkstuðul. Vit vilja heldur hyggja frameftir, og vit mugu loysi teir trupulleikar, ið hetta hevur givið okkum, sigur Lisbeth L. Petersen.

Magni Laksáfoss segði á fundinum, at sitandi samgonga hevði latið eina stóra rokning sita eftir til komandi landsstýrið, og hetta skal fáast í rættlag, samstundis sum týdningurin av at finna eina langsigtaða loysn ikki skal undirmetast.

Sambandsflokkurin ætlar ikki í landsbankan ella aðrastaðni eftir pengum fyri at fáa skil á fíggjarligu viðurskiftunum í landinum.